**Vit kunnu her avdúka nakað av tilfarinum, sum verður í TUNNILSBLØÐUNUM:**

## Ongatíð verið í Klaksvík



16 ára gamla Silja Joensen úr Hoyvík hevur ongatíð verið í Klaksvík. Ikki fyrrenn hósdagin í farnu viku slapp hon á fyrsta sinni við Dúgvuni – og seinastu ferð.

– Við Norðoyatunlinum kunnu fólk sjálvi ráða yvir tíðini, sigur unga hoyvíksdáman

*Lesið meiri í fríggjadagsblaðnum*

## Tunnilin til Gásadals kom ovseint



Karl Mikkelsen er bæði føddur og uppvaksin í Gásadali. Hann hevur fylgt væl við gongdini í tunnilsmálinum til heimbygdina.

– Okkara tunnil skuldi verið komin um somu tíð, sum tann til Kunoyar. Tá hann endiliga kom til okkum, var tað ov seint, sigur Karl.

*Lesið samrøðu og ferðafrásøgn úr Gásadali fríggjadagin*

# Norðoyatunnilin og Sosialurin



Leygardagin verður Norðoyatunnilin tikin alment í nýtslu. Í hesum sambandi fer Sosialurin at gera nógv burtur úr í tveimum teimum seinastu bløðunum hesa vikuna. Vit fara í blaðnum hósdagin og fríggjadagin at umrøða hendingina og nógv av tí, sum á ein ella annan hátt hevur tilknýti til hesa eina ta størstu hendingina í søgu norðinga og fyri samferðsluna í Føroyum sum heild.

Um onkur av okkara lesarum liggur inni við tilfari, sum hann ynskir at fáa uppá prent í sambandi við hesa hending ella hevur okkurt gott hugskotið til okkara, so skal hann seta seg í samband við redaktiónina skjótast – 341800 ella post@sosialurin.fo

Vit taka eisini móti lýsingum til hesi bæði "tunnilsbløðini". Setið tykkum í samband við lýsingadeildina 341800 ella lysing@sosialurin.fo





